undan óneyðugum trupulleikum. Men í hesi greinarøð verða hesi viðurskifti gjølla umrødd, soleiðis sum vit upplivdu tey.

Tað var so við og við, at vit merktu kollveltingina, serliga við sínum ágangi móti teimum kristnu. Tá ið vit eru komin til 1977 merkja vit hana rættuliga. Hetta er eisini árið, tá ið tann víttgongdi Mengistu Haile Mariam tryggjar sær endaliga valdið.

Nú varð missiónshúsið her í býnum, sum Mekane Yesus kirkjan eigur, stongt. Uppslag varð sett á dyrnar um, at kristiligar samkomur vóru bannaðar í framtíðini. Eisini varð sagt, at allar bíbliur skuldu verða tiknar frá fólki og brendar á báli.

Tað var bóndafelagið, sum gav hesi boð, men nú var tað ikki vist, at hetta varð sett í verk beinanvegin, tí lógirnar søgdu framvegis, at trúarfrælsi var í landinum. Bóndafeløg vóru skipað av nýggja stýrinum og vóru ein liður í "nærdemokratiinum" sum vera skuldi. Hesi feløg vóru tískil forlongdi armurin hjá myndugleikunum.

Vit gingu framvegis runt her á sjúkrahúsinum og býttu út lesnað. Øll, sum dugdu at lesa, vildu hava bíbliur. Ein, sum átti tvær bíbliur heima, ynskti eina afturat. Ofta vóru bíbliur niðurgrivnar so tær kundu finnast fram, um bíblian heima var tikin av myndugleikum.

Tað vardi heldur ikki leingi, at samkomuhúsið var stongt í hesum umfari. Kirkjan fekk húsini aftur, og myndugleikarnir góvu teimum kristnu rætt til at halda áfram við samkomum.

Men ein sunnudag kom ein hópur av ungdómum og órógvaði í missiónshúsinum, meðan møti varð hildið. Síðan tóku teir lykilin og stongdu húsið aftur.

Eisini hesa ferð fingið tey húsið aftur, og sunnudagin eftir var fult hús til møti. Nógv fólk stóðu uttanfyri vegna plásstrot.

## Tora ikki at syngja

Í juli 1979 vitji eg Doris Heinesen uppi í Geresse, sum bæði er ein býur og ein landspartur. Útsýnið var avbera vakurt. Luftin her uppi er munandi kaldari enn niðri í Arba Minch.

Doris kom sum áður greitt frá til Etiopia í 1971. Hon kom til Geresse í 1974 til eina missiónsstøð, sum Dansk Lutkersk Missióninsforening hevði ábyrgdina av. Sum aðrastaðni eru her í økinum fleiri tjóðbólkar. Men sum í nærum hvørjum landsparti er eisini minst ein amahariskur býur.

Doris hevur frá byrjan av uppbygt klinikkina í Geresse. Um hetta hevur hon greitt soleiðis frá:

"Tá ið vit vóru komin til Geresse á fyrsta sinni, fór eg beinanvegin at rigga klinikkina til. Fyrst av øllum pakkaði eg tey ymisku sløgini av medisini upp. Síðan tók eg ímóti teimum fyrstu sjúklingunum í gongini og køkinum heima hjá mær sjálvum. Fyrsta dagin kom ein sjúklingur, annan dagin komu 9, triðja dagin 30 og fjúrtan dagar seinni komu 72 sjúklingar at fáa viðgerð. Eg hevði ongar útlærdar hjálparar, men eg hjálptist kortini við teir, eg hevði. Fyrstu vikuna var tað húshjálpin, sum hjálpti mær. Síðan fekk eg til hjálpar ein av arbeiðsmonnunum hjá Erik Birch Andersen, sum bygdi missiónsstøðina. Hesin maður gjørdist kortdrongur hjá mær. Hann gav hvørjum sjúklingi eitt kort við navni og nummari á. Hann hevði gingið fýra ár í skúla og hevði lært so mikið, at hetta riggaði.

Dorit Larsen hjálpti mær eisini. Hon var gift við Frits Larsen leiðara á støðini. Hon hevði ikki lært til sjúkrasystir, men hon hjálpti mær við tablettunum og dugdi eisini at binda um sár. So fekk eg ein nýggjan hjálparmann. Hann gekk í 7. flokki og var eftir umstøðunum væl skúlaður. Klinikkin varð seinni flutt niður í bilskúrin, sum gjørdist eitt hugnaligt viðgerðarhøli. Uttanfyri settu vit beinkir at sita á. Tað vóru skjótt umleið 100 fólk til staðar, tá ið andakt varð hildin.

Higar vóru fólk eisini borin á børu. Summi komu eisini ríðandi á múldjóri. Ein dagin stóðu fýra múldjór "parkeraði" uttanfyri." Muldjór er avkom av hesti og esil. Tey eru sera áhaldandi og treyst, men kunnu ikki sjálvi fáa avkom.

Sum tað skilst hevur Doris verið einsamøll á støðini sum fakfólk innan sjúkrarøkt, og tað kann sigast, at hon hevur gjørt eitt slóðbrótandi arbeiði í Geresse.

Vit vóru í bygdini Monne. Tað var bratt at ganga oman í dalin. Ein hópur av kvinnum og børnum komu saman, og vit høvdu eitt gott møti.

Í Monne hevði verið kirkja, sum tó var forfallin. Ein dagin Doris kom oman í bygdina at hava kvinnumøti var kirkjan burturtikin. Viðin í kirkjuni hevði bóndafelagið tikið til ein skúla, sum eisini varð nýttur til politiskar fundir.

## Fongslað jólamorgun fyri ikki at fara á politiskan fund í kirkjutíð

Eg eri nú aftur í Arba Minch. Fólk komu langvegis frá fyri at fáa hjálp. Vit høvdu um hesa tíðina seks sjúklingar frá Geleb, sum liggur í útsynningshorninum av Etiopia. Tá ið eg kom til Etiopia høvdu vit bert hoyrt um Geleb, har livihátturin var nógv aftanfyri tað, sum annars var galdandi. Ongin her dugdi málið hjá teimum, so tað var bara við teknum, vit royndu at fáa samband við tey. Tey fingu øll skurðviðgerð og fóru heim í vikuna eftir við einum missiónsflogfari, sum tey eisini komu higar við. Hetta var so langt burtur, at tað var neyðugt at flúgva. Tað var ein hvítsunnusamkoma í Svøríki, sum rak missiónsvirksemi millum hesi fólk. Tey sendu ofta sjúklingar til okkara.

Víða hvar verða mong fongslað fyri sína trúgv á Jesus. Hetta komu vit eisini at merkja meira og meira.

Jólamorgun 1979 var ein hópur av fólki, sum vóru í kirkju her, sett føst, tí tey ikki vóru komin til ein politiskan fund, sum var settur at vera í kirkjutíð.

Eg fór sjálv í kirkju hendan morgunin. Komin niðan móti kirkjuni sá eg, at tað stóðu hermenn á vakt uttanfyri. Eg fekk tá at vita, at eini 200 fólk, sum vóru komin í kirkju í góðari tíð fyri at fáa pláss, vóru handtikin og førd í fangahús. Hini, sum vóru á veg í kirkju, rýmdu í ræðslu. Tann dagin var eingin gudstænasta. Sunnudagin eftir vóru tað bert 50 fólk, sum høvdu vágað sær í kirkju.

Tey flestu av teimum tiknu sluppu skjótt leys aftur, men nøkur sótu longur. Millum tey tiknu vóru eisini Jóhannes og Jákup. Vit koma í komandi parti at greiða frá, hvussu Elsabet upplivdi hetta.

Eg spurdi ein av vaktarmonnunum, sum kom á sjúkrahúsið við fangum til sjúkraviðgerðar: "Hví forfylgja tit teimum kristnu?" "Tí kristindómurin hóskar ikki saman við politikkinum, sum vit føra". segði hann. Sannleikin sagdur við fáum orðum.

Tey, sum sótu fyri sína trúgv, vórðu eisini stemplað sum landasvíkjarar. Hetta var tað, sum tey minst av øllum vilja vera. Tey vóru líka góð við sítt land, sum øll onnur.

Missiónshúsið niðri í býnum varð aftur tikið og nagli settur í hurðina. Kirkjan á missiónsstøðini varð framvegis opin. Men tað var ógvuliga umráðandi hjá teimum ráðandi at leggja politiskar fundir í kirkjutíð, og tað var tvungið at møta upp. Roynt varð so at broyta kirkjutíðina, men tá varð í skundi ein annar politiskur fundur settur somu klokkutíð, sum øll eisini høvdu skyldu at koma til.

Samtíðis sum sagt varð, at teir einki hava ímóti kristindóminumn, og øll kunnu trúgva, sum tey vilja, varð hetta gjørt. Bíbliur, sangbøkur, sangbond við kristiligum innihaldi og musikkinstrument, sum nýtt vórðu til gudstænastur, vórðu tikin frá teimum trúgvandi heima hjá teimum sjálvum.



*Tað er kølið viðhvørt í Geresse. Tá lívir væl við einum skinnplaggi*



*Ein partur av missiónsstøðini í Arba Minch við kirkju, skúlum og íbúðarhúsum*



*Kirkjan í Konso varð eitt skifti tikin til politisk endamál. Her hava teir hongt fløgg og slagorð frammanfyri krossin*